## Seinkað dreymaflogfar

Amerikanska Boeing verksmiðjan hevur boðað frá, at royndarflúgvingarnar av nýggja 787 Dreamliner flogfarinum verða seinkaðar í tríggjar mánaðir. Talan er um flogfar, sum er munandi lættari enn vanligu aluminumsflogførini, og sum tí brennur munandi minni enn verandi flogførini. Í fráboðanini sigur Boeing, at seinkingin stavar frá seinkanum í arbeiðinum við serliga Flight-control forritinum, og tí felagið hevur undirmett arbeiðið at framleiða serligu besløgini, sum skulu halda skrokkinum saman.



## Kórvenjing við Gøtugjógv

Felagskórið Gøta/Leirvík byrjar venjingarnar aftur týskvøldið 11. September í gamla skúlanum við Gøtugjógv. Í kórinum er umleið 30 fólk í ymsum aldri .Sum tíðin er gingin er tað eftir hondini fleiri og fleiri úr øðrum bygdum enn Gøtu og Leirvík, ið hava valt at syngja við kórinum. Tað hevur gjørt at kórið hevur havt ætlanir um at finna eitt navn, ið ikki er staðbundið, men enn er ikki komið víðari við tí málinum. Kórleiðari í ár verður 37 ára gamli Petur Martin Johannesen, úr Klaksvík. Petur Martin er útbúgvin og hevur arbeitt sum organistur í Oslo. Fyri stuttum er hann fluttur til Føroya og undirvísir í dag í orgulspæli í Føroya Musikkskúla



*Henny á Líknargøtu greiðir frá um íløguspælið*




*Reimund Langgaard greiðir frá møguleikunum*

# Kunningartiltak um íløguspæl væleydnað

**Fólk í øllum aldrum høvdu leitað sær í Miðlahúsið mikukvøldið, har greitt varð frá um nýggja íløguspælið. Meðan tey yngru fegin vilja duga at gera íløgur, tá tey einaferð koma til pengar, so síggja tey tilkomnu íløgur sum ein møguleika til pensjónina**

ÍLØGUSPÆL
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Tað skilst á øllum brøgdum, at tað ikki bert eru hugsjónarligirhandilsskúlanæmingar, ið hava áhuga fyri íløguspælinum hjá Kaupthing og Sosialinum. Tað er greitt, nú bert 3 dagar eru eftir til íløguspælið fer av bakkastokki. Mikukvøldið varð skipað fyri kunnandi tiltaki og hugnakvøldi í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har útvið 150 fólk høvdu funnið sær vegin fram. Lagt varð út klokkan átta við tónleiki frá Guðrið Hansdóttir, síðani varð greitt frá um íløguspælið og harnæst framløga hildin um partabrøv. Eisini bar til at fáa ein forsmakk upp á íløguspæli, tí teldur vóru settar upp, har ein kundi royna seg. Tiltakið vardi í umleið ein tíma.

Í skrivandi stund hava umleið 850 meldað seg til íløguspælið, sum er á www.ilogur.fo.

### Eggja ungfólki at hugsa um eftirløn

Fólk í øllum aldursbólkum vóru møtt upp, ung sum tilkomin, og hetta avsannaði einhvønn mistanka um, at tað bert eru tey ungu, sum tíma at spæla sovorðið á alnótini. Ein av fyrireikarunum, Reimund Langaard, sølumaður hjá Kaupthing, heldur, at tey tilkomnu í stóran mun hugsa um pensjónina, tá tey gera íløgur í partabrøv, og í so máta kann hetta spælið vera við til at geva teimum nakrar góðar ábendingar. Ivasamt er hinvegin, hvussu nógv tey yngru hugsa um eftirlønina, men tey hugsa kanska meiri um at læra seg at gera lønandi íløgur, tá tey í framtíðini fáa pening millum hendurnar.

- Eg havi varhugan av, at skúlanæmingar og ung fólk í heila tikið, sum ikki hava so nógvan pening í løtuni, fegin vilja læra seg kynstrið at seta pengar í skilagóðar íløgur, sigur Reimund Langgaard.



*Guðrið Hansdóttir undirhelt í Miðlahúsinum hetta kvøldið*

Hann afturvísir kortini ikki, at tað eisini er ein ávísur spenningur í at keypa partabrøv, og at hetta kann fáa adrenalinið í gongd hjá nógvum, eins og onnur spøl, sum snúgva seg um pening.

Hinvegin ynskir Kaupthing eisini at vekja áhugan hjá teimum ungu, tá tað kemur til eftirløn.

- Eg veit ikki hvussu nógv yngra ættarliðið hugsar um eftirløn, men vit vilja heilt víst eggja teimum til at gera sær tankar um hesi viðurskifti, sigur Reimund Langaard.

### Ein íløguskúli

Eingin ivi er um, at hetta ikki bara er eitt spæl, men harafturímóti ein íløguskúli, har ein kann venja seg við at keypa og selja partabrøv og taka kjansir, uttan tó at seta sínar ognir upp á spæl. Hetta er eitt slag av "learning by doing".

Íløgutíðarskeiðið hevur nógv at siga, tá tað kemur til partabrøv, og tá tosað verður um eitt íløgutíðarskeið upp á eitt longri áramál, so er stórur møguleiki fyri at fáa meiri burtur úr partabrøvum enn vanligum innláni í peningastovni.

Teir tríggjar mánaðirnar íløguspælið varir, frá 10. september til 10. desember, fer Sosialurin at koma við bakgrundstilfari og seta fokus á íløguspælið. Ætlanin er at hava fastan tátt við grein/um og tilfari í hvørjum mánadagsblaði og annars aðrar tíðir, tá okkurt áhugavert hendir.



*Allir aldursbólkar vóru umboðaðir á kunningartiltakinum mikukvøldið*